OM-liðið, sum vit vitjaðu í Kosovo, ger m.a. hjálpararbeiði millum illa staddar kvinnur og tannáringar. Kosovo var herjað av kríggi í 1998-99 og árinið av hesum sæst enn týðuliga í samfelagnum. Landið er næstfátækasta land í Evropa og arbeiðsloysið er 55% millum 15-24 ára gomul. Sostatt eru torført hjá ungum at fóta sær aftaná lidna skúlagongd sum ofta endar tá tey eru umleið 14 ár.

Arbeiðið hjá OM millum tannáringarnar miðar móti at geva teimum ungu førleikar, sum kunnu hjálpa teimum ávegis at fáa arbeiði. Tað er skipað sum frítíðarskúli, har gentur kunnu ganga til seymi/skræddara-skeið og dreingir kunnu ganga til barberskeið, elektrikaraskeið ella sveisiskeið. Skeiðini eru 2-4 tímar um vikuna og skeiðsluttakararnir eru útvald í samstarvi við sosialu myndugleikarnar. Tey ungu sum eru við í verkætlanini verða mett at vera í vandabólki, t.d. tí tey duga illa í skúlanum, eru byrjað at gerast kriminell ella koma frá vánaligum sosialum umstøðum. Tað var sera hugaligt at síggja hvussu spent tey ungu vóru, og vit sóu teir ungu dreingirnar bæði klippa hár, sveisa og forbinda el-leidningar, og vit sóu eisini genturnar sum seymaðu. OM arbeiðir eisini millum kreppuraktar kvinnur, sum typiskt eru rýmdar frá harðligum monnum og standa á berum við smáum børnum. Av tí at skúlagongdin er so vánalig duga tær ofta illa at lesa og skriva og duga heldur einki handverk. OM undirvísir teimum í seyming, soleiðis at tær kunnu fáa eitt arbeiði, umframt at tær læra at lesa og skriva.




O. Mëkëmbjes
"OJQ Operacioni i Mëkëmbjes"
AFTËSIM PËR ZANATE
Frítíðarskúlin

# Um Kosovo

- 1,8 mil. Fólk
- Lítið sindur størri enn Sjælland
- Høvuðstaðurin er Pristina
- Høvuðsmálið er albanskt
- Plagdi at vera ein partur av Serbia
- Frælsiskríggj í 1998-1999
- Næst fátækast í Evropa
- Arbeiðsloysi millum ung fólk er 55%
- Átrúnaðurin er 95% islam, 3% Kristin og 2% annað

